

# PhD-lesandi

**Fiskaaling hevur fingið stuðul frá Granskingarráðnum til PhD-verkætlanina »Vatngóðska innan aling á sjónum«, og vit søkja í hesum sambandi eftir PhD-lesandi til verkætlanina.**

**Verkætlan**
Í verkætlanini verða mátingar og numerisk model brúkt at greina ávirkanina frá nótum og fiski á vatngóðskuna innan aling á sjónum. Numeriska modeleringin fevnir m.a. um modelering av streymi ígjøgnum og kring alinótir á sjónum, meðan mátingarnar fara fram á sjónum kring eitt alibrúk í Føroyum.

Verkætlanin er eitt samstarv millum Fiskaaling og Náttúruvísindadeildina á Fróðskaparsetrinum, har tann PhD-lesandi kemur at arbeiða saman við royndum granskarum í Føroyum og úti í heimi.

**Ynskiligir førleikar til PhD-lesandi**
- góða universitetsútbúgving í náttúruvísindi ella verkfrøði, t.d. innan havfrøði, veskumekanikk, alivísind, evnafrøði, lívfrøði, alisfrøði og støddfrøði
- áhuga fyri aling og umhvørvi
- hegni til projektarbeiði, numeriska modelering, feltarbeiði og greinaskriving
- royndir við gransking og menning, góðan mál- og telduførleika

Meira fæst at vita um starvið frá Øystein Patursson, granskara, tlf.: 214787, oystein@fiskaaling.fo, Ingolf Joensen, stjóra, tlf.: 214747, ingolf@fiskaaling.fo, ella á www.fiskaaling.fo har m.a. verkætlanarlýsing er at finna.

**Umsókn**
Umsókn við ævisøgu (C.V.) og avriti av prógvum og viðkomandi skjølum skal sendast til: P/F Fiskaaling, Við Áir, Att.: Øystein Patursson, FO-430 Hvalvík. Umsóknarfreistin er 15. august 2009.

**Fiskaaling** er eitt alment partafelag, sum arbeiðir við gransking og menning innan alivinnuna og framleiðir tosk, síl og laks til føroysku alivinnuna. Virksemi á Fiskaaling er góðkent eftir ISO 9001:2000 standardinum. Felagið leggur dent á altjóða granskingarsamstarv við granskingarstovnar og vinnulív.

Á Fiskaaling starvast 5 granskarar, 2 PhD-lesandi og 12 fólk við royndum innan røkt, lívfiskaarbeiði og framleiðslu. Harafturat eru 2 granskarar uttanlands knýttir at felagnum.

Fiskaaling
Aquaculture Research Station of the Faroes

DANAK
Quality System according to DS EN ISO 9001 by Det Norske Veritas, Danmark A/S
DNV

---



# Les Sosialin so ert tú við

---

SAMSKIP

## » Samskip søkir hálvtíðar skrivstovufólk til innflutningsdeildina

**Starvslýsing:**
Sum skrivstovufólk á innflutningsdeildini hevur tú regluligt samskifti við viðskiftafólk í Føroyum og uttanlands.

Tú tekur tær av øllum vanligum skrivstovuarbeiði, sum í høvuðsheitum fevnir um fakturering, tollavgreiðslu, innan- og uttanhýsis sølu, eftirlitsuppgávur og arkivering.

**Førleikakrøv:**
Fyrimunur er, um tú hevur viðkomandi útbúgving og arbeiðsroyndir.
Vit leggja dent á ágrýtni, dugnaskap, nærlagni, miðvísi og tænastusinni, og at starvsfólk okkara ikki lata seg taka av fótum, um stundum trýst er á.
Vit vænta, at tú dugir væl at samskifta á føroyskum og enskum.

**Vit bjóða:**
- Eitt áhugavert, spennandi og fjølbroytt starv í heimligum og altjóða umhvørvi.
- Góðar møguleikar fyri persónligari menning.

**Setanartreytir:**
Starvið er hálvtíðarstarv og verður lønt sambært avtalu, sum er treytað av útbúgving og royndum.
Viðkomandi kemur at starvast á skrivstovu okkara í Tórshavn.

**Umsókn:**
Send umsókn við CV og øðrum viðkomandi skjølum til:

Samskip P/F
Yviri við Strond 23
Postsmoga 3255
110 Tórshavn

Merkt: "Umsókn"

Umsóknarfreistin er 17. august 2009 kl. 12.00.

**Starvið**
verður sett 1. september 2009.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Joel undir Leitinum, stjóra, á telefon 23 88 11

### » Fyritøkan

**Samskip er ein altjóða flutningsfyritøka. Fyritøkan er ein tann størsta bingjuflutningsfyritøkan í Europa og bjóðar millum annað flutning av vøru til og úr Føroyum. Í Samskip samtakinum arbeiða uml. 1.400 fólk í fleiri enn 20 londum. Samskip byrjaði í Føroyum í 2004 og er í dag ein av leiðandi feløgunum innan flutning til og úr Føroyum. Virksemið hjá Samskip verður samskipað í Kollafirði og Tórshavn. Frystigoymslan hjá Samskip í Kollafirði rúmar 7.000 tonsum. Skipini Helgafell og Arnarfell eru skrásett í FAS skipanini.. Tvey skip, á 900 TEUs hvørt, og eitt skip, 1.100 TEUs eru í fastari linjusigling til og úr Føroyum.**

---

FRÓÐSKAPARSETUR · FØROYA

# Fróðskaparsetur Føroya

## bjóðar í heyst skeið í føroyskum

Tú lærir at nýta málið sum amboð á ein góðan og fjøltáttaðan hátt í arbeiði og gerandislívi

Lærari: Lena Reinert

Tíðarskeið: 31. aug. - 18. nov. 2009
mánadag og mikudag, kl. 09.00 - 11.30
leygardagin 3. oktober kl. 09.00 - 14.30

Próvtøka: 23. og 25. november 2009

Fortreytir: Skeiðið er ætlað teimum, ið hava føroyskt á miðnámsskúlastigi ella samsvarandi

Tilmelding: Tilmeldingarskjal finnur tú á www.setur.fo

Tilmeldingarfreist: 17. august 2009

Skeiðsgjald: kr. 4.000,00

Næmingatalið er avmarkað. Gjaldast skal í seinasta lagi við skeiðsbyrjan

Skeiðs- og próvtøkugjald:
konto 9870 428.097.1
í Suðuroyar Sparikassa
viðm. navn og skeið

Skeiðsstaður: Fróðskaparsetur Føroya
Jónas Broncks gøtu 25, 4. hædd
100 Tórshavn

Tlf. 352500 ella setur@setur.fo
Upplýsing um skeiðið: Setursskrivstovan

Fyrivarni verður tikið fyri møguligum broytingum



FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
Setursskrivstovan · tlf. 35 25 00 · J. C. Svabos gøta 14
Postrúm 272 · 110 Tórshavn · www.setur.fo